## Írar arbeiðsleysir

Altjóða búskaparkreppan hevur rakt Írland sera meint. Tey seinastu hagtølini vísa, at í síðsta mánaði høvdu 12,7 prosent av teirri arbeiðsføru fjøldini einki at gera. Tað var 0,2 prosentstig meiri enn í desember. Tølini merkja, at 437.000 írar vóru arbeiðsleysir í januar, og tað var 13.000 fleiri enn mánaðin undan. Hagstovan í Dublin sigur í einari forsøgn fyri árið í ár, at nógv fólk fara at missa arbeiðið teir næstu mánaðirnar, og at arbeiðsloysið fer at veksa upp í 13,2 prosent seinni á árinum.



## Vilja hava oljuleiting

Tingbólkurin hjá íslendska Sjálfstæðisflokkinum vil hava stjórnina at skunda undir ætlanina at leita eftir olju og gassi á landgrunninum í landnyrðing úr Íslandi. Í áheitanini nevnir tingbólkurin eina leið, sum eitur Tjørnes-beltið. Hetta økið er stutt uttan fyri landgrunnin og ikki so langt úr landi sum Drekaleiðin, sum stjórnin hevur havt ætlanir um at loyva oljufeløgum at leita á. Sjálfstæðisfólkini siga í áheitanini, at ábendingar eru um, at bæði olja og gass kunnu vera í Tjørnes-beltinum, og at tíðin er komin til at fáa staðfest, um so er.

# Jóannes Eidesgaard klagaður enn einaferð

**Landsstýrismaðurin í fíggjarmálum hevur fjalt týðandi upplýsingar fyri Løgtinginum og tað má fáa avleiðingar, sigur Tjóðveldið. Men tað avsannar hann avgjørdur**

KLAGA
*Áki Bertholdsen*
*aki@sosialurin.fo*



*Jóannes Eidesgaard hevur víst óvanliga hugmóð mótvegis Løgtinginum, heldur Tjóðveldið, sum sigur seg ikki hava nakað val, uttan at klaga hann*

Landssýrismaðurin í fíggjarmálum hevur fjalt týðandi upplýsingar fyri Løgtinginum.

Tað heldur Tjóðveldi.

Og flokkurin heldur, at tað eigur at fáa avleiðingar.

Tí hevur Tjóðveldið enn einaferð klagað Jóannes Eidesgaard fyri landsstýrismálanevndini.

Tað er í málinum um at umskipa Húsalánsgunnin, at Tjóðveldið heldur, at landsstýrismaðurin hevur fjalt týðandi upplýsingar fyri Løgtinginum.

Í sambandi við ætlanina at umleggja Húsalánsgrunnin, hevur stýrið fyri grunnin skrivað fíggjarmálaráðnum bræv, har stýrið kallar ætlanina hjá samgonguni fyri eitt mistak, sum ikki fer at fáa Húsalánsgrunnin at virka aftur.

Men hetta skjalið hevur Jóannes Eidesgaard ikki lagt við sum hoyringsskriv til málið og tað metir Tjóðveldið vera so mikið álvarsamt, at landsstýrismaðurin verður klagaður fyri landsstýrismálanevndini.

### Óvanlig hugmóð

Kortini er skjalið seinni komið undan kavi í fíggjarnevndini.

- Var stýrið fyri Húsalánsgrunnin ikki av tilvild kallað inn til hoyringar í fíggjarnevndini um ætlanina at umskipa Húsalánsgrunnin, hevði lóggevandi valdið als ikki fingið at vita, hvørja støðu, stýrið og stjórnin fyri Húsalánsgrunnin, sum mugu metast at vera sakkunnleiki á økinum, hava til málið, Tórbjørn Jacobsen.

Høgni Hoydal sigur, at talan er um ógvuliga álvarsligt mál og er tekin upp eitt óvanliga hugmóð mótvegis Løgtinginum

Hann meinti, at Húsalánsgrunnurin má metast sum serfrøðingur á økinum og tí átti tað verið áhugavert hjá Løgtinginum at vita, hvørja áskoðan tey hava á eitt mál um at umskipa grunnin, serliga tá ið teirra áskoðan gongur at kalla beint tvørtur ímóti ætlaðu broytingunum hjá samgonguni.

Hann staðfestir, at Húsalánsgrunnurin hevur umsitið lógina í 40 ár og skal eisini umsita hana framyvir.

Heldur landsstýrismaðurin ikki, at tað hevur týdning fyri Løgtingið, tá ið tann stovnurin sigur, at soleiðis sum ætlanin er at broyta lógina, fer tað at vera tórført at fíggja virksemið hjá Húsalánsgrunninum, er bara hugmóðin eftir, tí sjálvandi er tað at fjala týðandi upplýsingar fyri Løgtinginum sigur Høgni Hoydal.

## Sethúsaeigarar sleptir upp á fjall

**Samgongan er í ferð við at avtaka einasta amboðið, sum tað almenna hevur at stýra bústaðarmarknaðinum**

BÚSTAÐARLÁN
*Áki Bertholdsen*
*aki@sosialurin.fo*

Í grannalondum okkara roynir tað almenna at stýra bústaðarmarknaðinum við bústaðarbanka, realkredittstovnum og øðrum.

- Og tað elvir til stúran, at einasta amboðið hjá tí almenna í Føroyum í løtuni, verður ikki tillaga, men heilt verður avtikið.

Tað er skoðsmálið, sum ætlanin hjá samgonguni at umleggja Húsalánsgrunnin, fær frá stýrinum fyri grunnin.

Við tilboðum um lága rentu, skáalán og annað, hava bankarnir miðvíst yvirtikið bústaðarlánini hjá Húsalánsgrunninum.

Við at tvinna vinnulán, húsalán og sethúsalán saman, hevur tað almenna ikki havt nakran møguleika at stýra bústaðarlánunum

Hinvegin hevur lógin fyri Húsalánsgrunnin forða honum í at fylgja við og skiftandi landssýrið hava ikki gjørt neyðugu tillagingarnar.

Og tí er ætlanin hjá samgonguni tað sama sum at sleppa sethúsaeigarum upp á fjall og tað elvir til stúran, at einasta stýringsamboðið hjá tí almenna, nú skal avtakast.

Stýrið vísir á, at ætlanin hjá samgonguni er, at Húsalánsgrunnurin í framtíðini ikki skal sleppa at fíggja sethúslán.

Men tað fær ikki grunnin at virka aftur.

Møguleikan at lata lán til lutaíbúðir, íbúðarstovnar og orkulán, hevur grunnurin longu nú, tó at tað er neryðugt við broytingum.

- Men verður lógin broytt, so at húsalánsgrunnurin eisini kann veita lán til sethús, møguliga sum ein realkredittstovnur, hevði tað komið samfelagnum til størri gagn.

Stýrið sigur eisini, at ætlaðu broytingarnar fara at fáa stóra ávirkan á inntøkurnar hjá grunninum og tí verður tað neyðigt at endurskoða raksturin.

Stýrið fyri Húsalánsgrunnin sigur bart út, at ætlanin hjá samgonguni um, at grunnurin ikki skal sleppa at lata sethúsalán, er eitt mistak.

- Tað er ongin loyna, at Húsalánsgrunnurin hevur verið ein trygd fyri at halda bústaðarrentuna niðri á einum lágum støði, til frama fyri sethúsaeigaran, ikki minst tann fíggjarliga veika, sigur stýrið.

# Eg havi onki fjalt fyri Løgtinginum

**Jóannes Eidesgaard vísir øllum skuldsetingum frá Tjóðveldinum aftur**

KLAGA
*Áki Bertholdsen*
*aki@sosialurin.fo*

- Eg havi ongar sum helst upplýsingar fjalt fyri Løgtinginum.

Tað staðfestir Jóannes Eidesgard, landsstýrismaður í fíggjarmálum.

Hann sigur, at tað er als onki hald í ákærunum, sum Tjóðveldið førir fram í greinini omanfyri

Hann staðfestir, at stýrið fyri Húsalánsgrunnin er ikki hoyringspartur í málinum og tí er talan heldur ikki um eitt hoyringsskriv, sum skal leggjast við málinum.

Annars vóru tíggju aðrir hoyringspartar í málinum. Fimm av teimum svaraðu og tey svarini eru øll løgd við.

Landsstýrismaðyrin staðfestir, at stýrið og stjóri fyri Húsalánsgrunnin eru partar í tilgongdini at umskipa grunnin.

- Men tað vísti seg skjótt, at stýrislimirnir vóru so nógv upptiknir av øðrum arbeiði, at tað var tórført at savna tað. Tí mælti stýrið til, at fíggjarmálaráðið gjørdi uppskotið liðugt og sendi tað aftur til stýrið til viðmerkingar og tað varð gjørt, sigur Landsstýrismaðurin.

- Tað ger tey ikki til hoyringspart í málinum og tað er ikki altíð, at embætisfólkini eru samd við tí politiska viljanum. Og tað er eisini støðan í hesum føri. Men tað er tann politiski viljin, at Húsalánsgrunnurin skal broytast eftir uppskotinum, sum liggur í Løgtinginum.

Av tí at stýrið og stjórnin fyri Húsalánsgrunnin eru partur í tilgongdini metir Jóannes Eidesgaard svarið frá teimum sum eitt arbeiðsskjal og tað er ikki vanligt at leggja arbeiðsskjøl við í einum einum máli.

Hann sigur, at embætisfólk í innlendismálum ella mentamálaráðnum, eru heldur ikki hoyringspartar í málum, sum tey ráðini leggja fram.

Men hann gjørdi eisini greitt, at vil Løgtingið hava innlit í svarið frá Húsalánsgrunninum, skal hann ikki leggja eitt holmstráð í vegin fyri tí

Bjørt Samuelsen helt, at í viðmerkingin frá Húsalánsgrunninum var at meta sum ein serfrøðilig ráðgeving í málinum.

Og fær Løgtingið ikki slíkar upplýsingar, hevur tað heldur ikki nóg gott grundarlag at viðgerða málið í, heldur hon.

- Hvussu skal Løgtingið fáa teir rættu upplýsingarnar, spyr hon.

Tórbjørn Jacobsen helt ikki, at stýrið fyri Húsalánsgrunnin á nakran hátt kann samanberast við embætisfólk hjá einum ráði í landsstýrinum, tí talan er um eina sjálvstøðuga, løgfrøðiliga eind.

Tí hevði hann illgruna um, at upplýsingarnir vórðu fjaldir fyri Løgtinginum við vilja.